# Mentanarligur toppfundur í Havn

**Norðurlendski mentanarpolitikkurin næstu árini verður í hesum døgum stungin út í kortið á ráðstevnu í Norðurlandahúsinum**

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ikki færri enn 70 umboð fyri mentanarøkið í Norðurlondum sita í løtuni á fundi í Norðurlandahúsinum og endurskoða a førda norðurlendska mentanarpolitikkin seinnu árini. Úrslitið skal sendast ovastu leiðsluni á økinum, Norðurlandaráðnum og Nordisk Kulturfond, sum uppskot til, hvørja leið norðurlendska mentanarsamstarvið skal ganga komandi árini.

### Ítøkilig uppskot

Størsti parturin av ráðstevnini er skipaður sum eitt ítøkiligt arbeiðsseminar, har luttakaranir arbeiða í bólkum við ymsum uppskotum. Longu nú er greitt, at broytingarnar sum vóru gjørdar í norðurlendska mentanarsatarvinum í 2007 ikki eru nøktandi. Hetta kom longu fram á fundi í Reykjavík í apríl.

Millum annað eftirlýsa mentafólk framvegis størri opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við Nordisk Kulturforum, eins og tey eisini fýlast á, at ov lítil samanhangur er í førda politikkinum. Eisini verður víst á, at arbeiðið á stovninum er ov lítið viðkomandi fyri fólksliga almenningin, eins og nógva kjakið um norðurlendska mentan í globaliseringini er ov ófokuserað. Spurningurin um, í hvønn mun list eisini skal vera ein søluvøra er eisini uppi at venda.

Sambært innleiðandi orðunum í morgun hjá Lene Bak, ráðgeva, er tó longu bøtt um fleiri viðurskifti við broytingunum frá 2007. Eitt nú fara meir orka og pengar nú til mentan og minni til fyrisiting, eins og alt fleiri ung fólk nú gera seg galdandi í mentanarpolitiska samstarvinum. Eisini er meir pláss vorðið til tvørfakligt samstarv.

Enn er tó nógv sum kann gerast betri og nógvar ymsar meiningar um, hvussu tað skal gerast. Tí var longu í morgun nógv sum bendi á, at norðurlendsku mentafólkini fáa eitt lívligt kjak fram til seinnapartin í morgin, tá fundurin endar.



*Leiðslan í Nordisk Kulturfond var eisni møtt á fundinum: Her eru tað Poul Bagge, næstformaður, Karen Bue, stjóri, og Bente Dahl, formaður*



*Millum føroysku umboðini á fundinum vóru millum onnur Oggi Lamhauge, nevndarlimur í LISA, Rakel Helmsdal, forkvinna í Rithøvundafelagnum, og Marius Dalsgaard, skrivari í Lisa*





Í nærum 130 ár hevur Wella Professionals støðugt ment seg í tøttum samstarvi við hárfríðkanarfólk og hárfríðkanarstovur. Tað, sum byrjaði sum ein dreymur hjá einum einstakum manni, fevnir nú um fleiri enn 4 mió. hárfríðkanarfólk um allan heimin. Wella er í dag partur av heimsins størsta virki innan hárfríðkan. Hetta kemur sjálvandi eisini kundunum til góðar.

WELLA PROFESSIONALS

Wella demoshow & workshop

**STINE & LASSE frá Wella Professionals koma nú til Føroya við nýggjasta mótarákinum frá útheiminum.**

**STÓRT-DEMOSHOW** verður á Hotel Hafnia í Havn leygardagin 5. september frá kl. 16.00 – 19.30

**WORKSHOP** við praktiskum arbeiði verður á Frisørskúlanum í Havn sunnudagin 6. septembur
- Workshop I kl. 09.00 – 12.30
- Workshop II kl. 13.30 – 17.00

Vít fara at bjóða øllum hárfríðkanarfólkum kring landið at vera við og soleiðis nema sær kunnleika og fáa íblástur til nýggjasta rákið innan alheims hármóta.

**Kostnaðurin fyri skeiðini er:**
Demo-show: ..................... kr. 1.000,-
Workshop: ...................... kr. 1.200,-

Avmarkað luttakaratal!

Tilmelding á
tel. 31 30 50
áðrenn 31. august.



M. HEINASONARGØTA 19 TEL. 31 30 50 SMS TEL. 32 30 50 MCGAVIN@MCGAVIN.FO WWW.MCGAVIN.FO